**30. desember 2024**

**Fylgisskjal 3**

## Dag- og umlættingarstovnurin Dreymsóljan

Dag- og umlættingarstovnurin Dreymsóljan heldur til á Leitisvegi 58 í Miðvági. Almannaverkið varðar av stovninum.

Talan er um ein stovn, ið veitir dag- og frítíðartilboð og samdøgursumlætting til børn við fjølbreki.

Stovnurin hýsti fýra børnum við fjølbreki. Børnini fingu bæði dagtilboð og samdøgursumlætting í Dreymsóljuni.

Samdøgursumlættingin var skipað soleiðis, at hon í mestan mun var lagað til tørvin hjá einstaka barninum. Børnini svóvu í hvør sínum kamari, og øll børnini høvdu baðirúm saman. Harafturat høvdu børnini atgongd til felagsrúm.

Á heimasíðuni hjá Almannaverkinum stendur soleiðis at lesa um stovnin:

> “Endamálið við stovninum er at veita dag og frítíðarskúlapláss til børn við likamligum ella sálarligum breki, ið ikki kunnu vera á kommunalum dagstovni ella frítíðarskúla. Harafturat verður veitt skipað umlætting til heimabúgvandi børn, í vikuskiftinum og yrkadagar.
>
> Vit leggja okkum eftir at veita eitt mennandi námsfrøðiligt og heilsufakligt tilboð. Vit arbeiða miðvíst eftir at skapa ein álítandi og mennandi gerandisdag við stimbran, røkt og upplivingum í samstarvi við foreldur og avvarðandi.”

Á stovninum starvaðust nýggju starvsfólk, umframt leiðaran. Talan var um starvbólkarnar námsfrøði, sjúkrarøktarfrøði, ergoterapi, heilsuhjálparar og heilsurøktarar.

## Samanumtøka og tilmæli

Samanumtikið er tað fatanin hjá umboðsmanninum at talan var um ein vælriknan stovn, ið var vælegnaður til málbólkin og við góðum starvsfólki at taka sær av serliga tørvinum hjá børnunum. Stórur dentur tyktist at verða lagdur á at skapa eitt barnsligt og hugnaligt umhvørvi, ið var mennandi fyri sansirnar og stimbrandi fyri samskiftið hjá børnunum. Harafturat var fokus á at geva børnunum upplivingar í nærumhvørvinum, og tá umstøðurnar loyvdu tí, eisini aðrastaðni í Føroyum. Umboðsmaðurin gav í hesum høpi gætur, at avvarðandi samanumtikið lótu væl at stovninum, hóast ávísir batar ynsktust á summum økjum.

Grundað á samrøðuna við leiðsluna á stovninum, samrøðuna við tey avvarðandi, skjøl, ið umboðsmaðurin hevur fingið útvegað frá stovninum, og samskiftið við avvarðandi myndugleikar, hevði umboðsmaðurin soljóðandi viðmerkingar og tilmæli.

**Húsreglur, telefonpolitikkur o.líkn.**
Umboðsmaðurin spurdi leiðsluna, um stovnurin hevði ein telefonpolitikk. Avvarðandi høvdu víst á onkra støðu viðvíkjandi telefonnýtslu hjá starvsfólki, ið tey hildu vera óhepna. Leiðslan upplýsti fyri umboðsmanninum, at telefonnýtsla í ávísan mun var neyðug í sambandi við dagliga arbeiðið, men at Almannaverkið hevði ein almennan telefonpolitikk, ið stovnurin fylgdi. Umboðsmaðurin fekk eftirfylgjandi útflýggjað eitt avrit av galdandi telefonpolitikki. Umboðsmaðurin fann onga orsøk at viðmerkja telefonpolitikkin.

Umboðsmaðurin mælti til, at leiðsla og starvsfólk støðugt vóru tilvitað um telefonnýtsluna, og at nýtslan altíð fylgdi galdandi telefonpolitikki, og at starvsfólk altíð høvdu kunnleika til galdandi telefonpolitikk. Umboðsmaðurin mælti eisini til, at leiðslan umhugsaði, um tey avvarðandi skuldu fáa kunning um, á hvønn hátt telefonnýtsla var neyðug í sambandi við dagliga arbeiðið á stovninum, soleiðis at byrgjast kundi fyri møguligum misskiljingum.

**Kunning og móttøka**
Í samrøðuni, ið umboðsmaðurin hevði við avvarðandi, varð víst á, at móttøka, í sambandi við at børnini komu á stovnin, var eitt evni, ið tey avvarðandi hildu kundi verið skipað betri.

Leiðslan greiddi eftirfylgjandi frá, at avtalað var, at tá vaktin byrjaði sín dag, býttu starvsfólkini børnini millum sín, soleiðis at tað var heilt greitt, hvør tók ímóti hvørjum barni. Leiðslan vísti á, at hon var greið yvir, at tað hevði stóran týdning, at móttøkan av barninum ikki var tilvildarlig og var skipað eftir einari greiðari mannagongd.

Umboðsmaðurin mælti til, at leiðslan skipaði soleiðis fyri, at greið mannagongd altíð var fyri, hvussu starvsfólk tóku ímóti børnunum, og at øll starvsfólk altíð høvdu kunnleika til, hvør mannagongd var galdandi, og hvussu hon varð fylgd.

Í samrøðuni við tey avvarðandi var eisini víst á, at kunning var eitt evni, ið tey avvarðandi hildu kundi verið skipað betri.

Leiðslan vísti á, at tey vóru í gongd við at fáa eina talgilda samskiftisskipan, ið eisini varð nýtt innan dagstovnaøkið, men at tað ikki var greitt, nær hon fór at verða sett í verk.

Umboðsmaðurin mælti til, at leiðslan arbeiddi víðari við at fáa eina samskiftisskipan klára og kunna tey avvarðandi um, nær hendan skipanin kundi væntast at verða sett í verk.

**Virkisætlanir**
Sambært § 33, stk. 1 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur skal ein virkisætlan leggjast fyri tænastuna, ið ein borgari fær frá stovninum. Hendan virkisætlan fevnir

m.a. um, hvørji mál og lutmál strembast skal eftir at røkka, uppgávubýti og ábyrgdarbýti millum borgaran og starvsfólkið í mun til at røkka settum málum, mett tíðarskeið fyri at røkka málunum, og eftirmeting og tillaging av settum málum.

Kravið um virkisætlanir í § 33, stk. 1 í omanfyrinevndu lóggávu fevnir um allar tænastur, ið veittar verða við heimild í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, undir hesum eisini umlætting.

Leiðslan upplýsti fyri umboðsmanninum, at enn vóru ikki virkisætlanir gjørdar fyri øll børnini, ið vóru á stovninum. Leiðslan upplýsti, at hettar fór at verða gjørt.

Umboðsmaðurin spurdi aftaná eftirlitsvitjanina leiðsluna, um foreldrini vórðu tikin við í tilgongdina at gera virkisætlan fyri teirra børn, t.d. soleiðis at teirra ynskir um venjingar fyri børnini kundu takast við.

Leiðslan upplýsti eftirfylgjandi, at ynskini hjá foreldrunum vórðu tikin við í tann mun, hetta lat seg gera.

Umboðsmaðurin mælti til, at børnini á stovninum altíð høvdu dagførdar virkisætlanir, og at tilgongdin at gera virkisætlanir varð løgd soleiðis til rættis, at ynskini hjá teimum avvarðandi til ætlanina eisini vórðu viðgjørd.

**Skemaætlan**

Í samrøðuni, ið umboðsmaðurin hevði við avvarðandi, varð víst á, at skemaætlan kundi verið framd skjótari og laga seg meira til tørvin hjá einstøku familjunum.

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at skemaætlan framyvir fór at verða løgd til rættis eitt hálvt ár hvørja ferð.

Umboðsmaðurin spurdi aftaná eftirlitsvitjanina, hvussu hædd varð tikin fyri ynskjum hjá avvarðandi í sambandi við skemaætlan.

Leiðslan upplýsti eftirfylgjandi, at avvarðandi altíð kundu siga leiðsluni frá sínum ynskjum, og at leiðslan síðani tók støðu til, um ynskini kundu gangast á møti.

Umboðsmaðurin mælti til, at leiðslan samskifti við tey avvarðandi í sambandi við tilgongdina at gera eina skemaætlan, soleiðis at tey avvarðandi fingu kunning í góðari tíð, um teirra ynskir til ætlanina kundu gangast á møti.

**Koyring**

Leiðslan upplýsti, at koyring var ein avbjóðing, og at tey fóru í gongd við at søkja um at fáa ein buss, soleiðis at tað bar til at nøkta tørvin hjá børnunum fyri uttanduravirksemi, t.d. útferðir og

ymisk tiltøk uttanfyri nærumhvørvið. Leiðslan greiddi frá, at børnini gjørdust eldri og tískil gjørdist tørvurin á einum rúmligum og vælegnaðum akfari eisini størri.

Umboðsmaðurin mælti til, at leiðslan arbeiddi víðari við ynskinum um at fáa eitt nøktandi akfar til stovnin, soleiðis at børnini, uttan mun til teirra serliga tørv, kundu fáa góðar og stimbrandi upplivingar, bæði í nærumhvørvinum og uttanfyri nærumhvørvi.

**Skúlagongd**

Leiðslan greiddi frá, at tvey av børnunum vóru í skúlaaldri, men at skúlatilboðið til teirra ikki var klárt enn.

Sambært kunngerðini á økinum verða serflokkur skipaðir sum serligt skipað undirvísingartilboð undir skúlaleiðsluni í tí skúla, har serflokkurin er staðsettur og við sernámsfrøðiligari ráðgeving frá Sernámi. Í hesum føri var talan um sernámsfrøðiliga tilboðið “Pallin”, ið Sørvágs skúli varðaði av.

Umboðsmaðurin bað eftirfylgjandi Undirvísingarstýrið um at greiða frá støðuni og orsøkini til, at skúlatilboðið ikki var klárt til skúlaárið 2024/25.

Undirvísingarstýrið ásannaði í svarið sínum, at skúlatilboðið ikki var klárt til skúlaárið 2024/25, men vísti á, at sjálv skúlagongdin var undir uppbygging og varð ment so hvørt, inntil skúlatilboðið eftir ætlan væntandi varð heilt klárt til skúlaárið 2025/26.

Undirvísingarstýrið ásannaði eisini, at tilgongdin átti at gingið skjótari, og at ov long tíð var fráliðin við ov fáum avgerðum. Í hesum høpi metti Undirvísingarstýrið, at tað í málum um skúlagongd hjá børnum, ið bera brek, kundi tænt eini skjótari og tryggari tilgongd, um Undirvísingarstýrið var virkið í visiteringini og hevði eitt slag av savnandi fyrisitingarligari uppgávu millum fleiri partar, har felags loysnir vóru neyðugar. Undirvísingarstýrið upplýsti, at sambært kunngerðini á økinum, hevði stýrið ikki møguleika at vera virkið í visiteringini, og at hetta tí fór at krevja broytingar í kunngerðini.
Í sambandi við skúlagongd hjá børnum, ið bera brek, vísti umboðsmaðurin á art. 23 og 28 í Barnarættindasáttmálanum og art. 24 í Breksáttmálanum. Felags fyri hesar sáttmálaásetingar er, at tær skipa rættindi hjá børnum at fáa eina munagóða frálæru, uttan mun til teirra brek, og verða stuðlaði soleiðis, at tey kunnu ganga í skúla saman við børnum, ið ikki bera brek.

Umboðsmaðurin helt, tað ikki vera nøktandi, at avvarðandi myndugleikar ikki høvdu borið seg skjótari at í tilgongdini at gera eitt nøktandi skúlatilboð til børnini, soleiðis at hesi kundu byrja sína skúlagongd um somu tíð sum onnur javnaldrandi børn.

Umboðsmaðurin tók undir við Undirvísingarstýrinum at fáa viðurskiftini skipaði øðrvísi og heitti á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um skjótast gjørligt at taka neyðug stig til at tryggja, at børn, ið bera brek, altíð kunnu byrja sína skúlagongd samstundis sum børn um sama aldur byrja teirra skúlagongd. Umboðsmaðurin helt, at tað var av alstórum týdningi, at skúlagongd hjá børnum, ið

bera brek, samsvaraði við omanfyrinevndu sáttmálaásetingar í Barnarættindasáttmálanum og Breksáttmálanum.